

# HANDREINFØRI

## *SJÚKLINGAR, AVVARÐANDI OG VITJANDI*

SJÚKRAHÚS
VERKIÐ

SUÐUROYAR SJÚKRAHÚS

Innihaldið í hesum faldaranum
er dagført 10.04.2026

## KØKURIN Á SEINGJADEILDINI

Sambært reglugerðum frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni er ikki loyvt sjúklingum og avvarðandi at seta egnan mat í køli- ella frystiskápið í køkinum á seingjadeildini, hetta fyri at tryggja gott reinføri í køkinum.

Eitt køliskáp, sum sjúklingar kunnu brúka, stendur á ganginum uttan fyri stovu 7.

## HANDREINFØRI - INNLAGDIR SJÚKLINGAR

Gott handreinføri hevur stóran týdning fyri at fyribyrgja smittu og smittuspreiðing.

Sjúklingar eru – av tí at teir eru sjúkir – meira viðkvæmir fyri smittandi sjúkum. Á sjúkrahúsi eru nógv fleiri sjúkuelvandi smáverur, enn tað eru aðrastaðni í samfelagnum.

**Tí mæla vit til, at tú vaskar ella sprittar hendurnar ofta, meðan tú ert innlagdur/innløgd.**

Við góðum handreinføri minkar tú um vandan fyri, at tú verður smittað/ur, samstundis sum tú forðar fyri, at tú smittar onnur.

## Tú minkar um smittuvandan um tú:

→ *vaskar hendurnar væl við vatni og sápu. Vatn og sápa reinsa smittuelvandi smákyknir av hondunum.*

→ *turkar hendurnar væl, tá tær eru vaskaðar.*

→ *brúkar handspritt til at sóttreinsa hendurnar. Handspritt skal gníggjast í hendurnar til tær eru turrar.*

## Tú skalt vaska hendurnar:

- áðrenn tú etur
- aftaná tú hevur bustað tenn ella handilstenn
- aftaná tú hevur hostað, njóst ella turkað tær um nøsina
- aftaná tú hevur verið á WC ella hevur tikið í pissufløsku ella pissukolbu
- tá ið tú følir ella sært, at tú ert skitin um hendurnar
- áðrenn og aftaná, at tú hevur nortið við:
  sár, umbindingar, eksem, dren, bløðrukatetur, stomiposa e.l.

**Sápa og spritt hanga við vaskið á øllum sjúklingastovunum.**
**Vegleiðingar hanga á øllum vesunum**

# Vaska hendurnar soleiðis:



**Væta hendurnar**



**Fá tær sápu**



**Gníggja lógvarnar**



**Vaska tumlarnar**



**Vaska neglirnar**



**Skola hendurnar**



**Turka hendurnar**

Suðuroyar Sjúkrahús    tlf. 34 33 00    www.sjukrahus.fo    ssh@ssh.fo